Fylgiskjal 12

umhvørvisstovan

Heilsu- og innlendismálaráðið

Argir hin 11. september 2018
Málsnr.: 18/00641-2
Tykkara málsnr.:
Málsviðgeri: Suni Petersen

**Hoyringarsvar til uppskot til broyting í løgtingslógunum um náttúrufriðing, kærunevnd í lendismálum og umhvørvisvernd**

Umhvørvisstovan hevur fingið uppskot til broyting í løgtingslóg um náttúrufriðing, broyting í løgtingslóg um kærunevnd í lendismálum og broyting í løgtingslóg um umhvørvisvernd til ummælis.

Umhvørvisstovan hevur hesar viðmerkingar:

**1. Løgtingslóg um náttúrufriðing**

Umhvørvisstovan hevur ongar viðmerkingar til sjálvt broytingaruppskotið.

Í kap. 2.1 í viðmerkingunum um fíggjarligar avleiðingar verður m.a. sagt, at "Mett verður, at Umhvørvisstovan má seta nýggjan fulltrúa at umsita lógina, og mælt verður til at játta 600.000 kr. til hetta."

Umhvørvisstovan ivast í, um ein fulltrúi einsamallur fer at kunna røkja tær uppgávur, sum fylgja við. Sambært Hagstovuni hava í árunum 2015, 2016 og 2017 verið ávikavist 83, 80 og 54 mál til viðgerðar í Yvirfriðingarnevndini. Hetta eru eyðvitað serliga mál um loyvi til bygging o.a. sambært § 2 í lógini, og snýr tað seg ivaleyst um bæði størri og smærri mál. Umhvørvisstovan hevur áður ført fram, at vit meta, at neyðugt er við í minsta lagi tveimum starvsfólkum fyri at røkja uppgávuna til lítar.

Tí kann spurningur setast um, hvørt fyrisitingin av náttúrufriðingarlógini fer at taka orku frá fyrisitingini av ætlaðu margfeldislógini, um tað bara verður játtan til ein fulltrúa.

**2. Løgtingslóg um kærunevnd í lendismálum**

Umhvørvisstovan hevur bara eina viðmerking til § 1, nr. 2 í uppskotinum:

Umhvørvisstovan mælir til, at "náttúru-, umhvørvis- og" verður skoytt uppí, so at § 1 verður orðað soleiðis:

"Landsstýrismaðurin setur kærunevnd í *náttúru-, umhvørvis- og* lendismálæum við fimm nevndarlimum......".

**3. Løgtingslóg um umhvørvisvernd**

Umhvørvisstovan hevur ongar viðmerkingar.

Vinarliga

Suni Petersen, deildarleiðari